# Ein meksikanskur biti í Havn

**Matstovan Rio Bravo bjóðar viðskiftafólki sínum meksikanskan mat hvønn dag. Talan er um mogunmatartilboð, har matskráin fer at skifta regluliga**

MATSTOVA
*Edvard Joensen*

Nú ber eisini til dagliga at fáa meksikanskan mat á matstovu í Havn. Tað er matstovan Rio Bravo, sum hevur hetta tilboðið til viðskiftafólkið.

Í umleið eina viku hevur Rio Bravo hvønn fyrrapart og nakað út á seinnapartin verið gjørd um til eina spennandi meksikanska matstovu, har allur matur er meksikanskur ella meksikanskt ávirkaður.

Talan er um eitt av teimum nógvu fyrrapartstilboðunum, har fólk fyri lítið og lætt kunnu fáa sær mettuna í eini fríløtu frá arbeiðsplássinum.

Sjálvtøkuborð úr Meksiko, har ein kann fylla so nógv og so ofta á borðiskin, sum niður gongur.

– Hetta ger, at vit nú kunnu hava matstovuna opna allan dagin, sigur Kári Hentze leiðari á Rio Bravo og Hotel Vágum, sum eigur Rio Bravo. Hesi fyrrapartstilboðini eru nógv, og vit hava valt at gera okkara soleiðis fyri líkasum at liva upp til navnið, sum leiðir hugin til Meksiko. Soleiðis kunnu vit eisini gera umhvørvið eitt sindur meira spennandi, sigur hann.

Hann sigur, at tað verður ikki sama matskráin alla tíðina. Hon fer regluliga at skifta, so fólk ikki troyttast av henni, sigur Kári Hentze.



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig – um kvøldið kaldari.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og kavaælingur. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin minkar hann vindin av útnyrðingi og yvirhøvur turt. Hitin um frostmarkið. Um kvøldið veksur hann vindin av útsynningi og regn.Hitin upp í 5 stig. Sunnudagin strúkur í vindi av vestri og ælingur. Hitin um 6 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷6 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 4 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 19 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst. 983 hPa. yviri á Eysturlandinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani fer um Føroyar mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/11 kl. 06[00]–09/11. 06[00]. Hitin í gjár: 8,3°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 08/11 kl. 06[00]–09/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 34,0 mm

## TIPS 12 úrslit
**Vika 45 – 7. november**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | FC København–AGF | **2** |
| 2. | FC Midtjylland–Herfølge | **1** |
| 3. | OB–FC Nordsjælland | **1** |
| 4. | Randers FC–Silkeborg | **1** |
| 5. | B 93–AC Horsens | **2** |
| 6. | FC Fredericia–Dalum | **X** |
| 7. | Køge–AB | **1** |
| 8. | Næstved–Skjold | **2** |
| 9. | Ølstykke–Brønshøj | **2** |
| 10. | FC Roskilde–Aarhus Fremad | **2** |
| 11. | Glostrup–Holstebro | **1** |
| 12. | Lyngby–Kalundborg | **1** |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **6.701,- kr.** |
| 11 røtt: | **296,- kr.** |
| 10 røtt: | **38,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 45 – 7. november**

1. Centrum:
**71 - 40 - 72 - 41 - 55 - 20 - 53 - 12 - 13 - 70 - 28 - 25**

1. Ramme:
**69 - 67 - 06 - 58 - 31 - 11 - 49 - 27 - 50 - 45 - 07 - 19 - 15 - 52 - 37 - 73 - 14 - 65 - 54 - 63 - 08 - 18 - 68 - 62**

Fuld plade:
**21 - 39 - 16 - 59 - 02 - 24**

Fri spil: **B__EN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **123.974,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **10.714,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **10.714,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **1.251,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **69,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

2. november: Mánin longst frá jørðini
5. november: Seinna kvarter
12. november: Tendring
14. november: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. nov | 04.18 | 16.38 | 03.18 | 15.38 | 03.33 | 15.53 | 06.18 | 18.38 | 07.18 | 19.38 | 02.33 | 14.53 | 01.33 | 13.53 | 04.33 | 16.53 | 05.33 | 17.53 | 04.03 | 16.23 | 05.18 | 17.38 |
| 11. nov | 04.59 | 17.21 | 03.59 | 16.21 | 04.14 | 16.36 | 06.59 | 19.21 | 07.59 | 20.21 | 03.14 | 15.36 | 02.14 | 14.36 | 05.14 | 17.36 | 06.14 | 18.36 | 04.44 | 17.06 | 05.59 | 18.21 |
| 12. nov | 05.44 | 18.08 | 04.44 | 17.08 | 04.59 | 17.23 | 07.44 | 20.08 | 08.44 | 21.08 | 03.59 | 16.23 | 02.59 | 15.23 | 05.59 | 18.23 | 06.59 | 19.23 | 05.29 | 17.53 | 06.44 | 19.08 |
| 13. nov | 06.34 | 19.00 | 05.34 | 18.00 | 05.49 | 18.15 | 08.34 | 21.00 | 09.34 | 22.00 | 04.49 | 17.15 | 03.49 | 16.15 | 06.49 | 19.15 | 07.49 | 20.15 | 06.19 | 18.45 | 07.34 | 20.00 |

5 707265 100036 >